## DAGSINS MEINING

# Broyttar fortreytir

Sunnudagin var tunnilsrenning, og fleiri túsund fólk fóru fyri fyrstu ferð yvir um Lorvíksfjørð til gongu. Hetta er í roynd og veru ein stórhending og Føroyar verða ongantíð tær somu eftir hendan tunnilsrenningardag. Eftir hendan dag hava 85% av landsins borgarum fast samband, og Føroyar eru ikki longur nakað beinleiðis oyggjasamfelag. Norðoyatunnilin er eitt ómetaligt framstig, sum vit eins og øll onnur fegnast stórliga um. Vit øll eiga samstundis nú so smátt at fara at gera okkum greitt, hvat hetta merkir, at Føroyar ikki longur eru eitt oyggjaland eins og tær vóru fyri allar tunnilsgerðirnar.

Hvat merkir eitt so nógv broytt undirstøðukervi? Hvussu skulu vit planleggja og hvussu skulu vit útbyggja framyvir? Hvat merkir hetta grundleggjandi broytta undirstøðukervið fyri samfelagsbygnaðin. Tað kann uttan víðari staðfestast, at nýggja undirstøðukervið broytir nógvar fortreytir fyri tí samfelagsbygnaði, ið higartil hevur eyðkent Føroyar. Hesin bygnaður hevur í stóran mun verið merktur av, at vit eru eitt oyggjasamfelag. Hetta vil so aftur siga, at vit hava havt nógvar smáar eindir innan almenna bygnaðin. Hetta er sera dýrt og órationelt. Hetta er ein forðing fyri fullnýtslu av landsins fíggjarliga og menniskjansliga tilfeingi.

Tað er tískil neyðugt at farið verður undir eitt alment orðaskifti um tær samfelagsligu fylgjurnar av tí broytta undirstøðukervinum. Vit siga als ikki, at allir almennir stovnar skulu miðsavnast í Tórshavn. Tað verði langt frá okkum at halda tað. Men spurningurin er, um vit ikki verða noydd at hugsa í nýggjum sporum. Hetta merkir, at vit noyðast at líta at øllum fortreytum og øllum skipanum. Vit noyðast at endurskoða skúlaverk, heilsuverk og allar almennar tænastur og so royna at finna eina breiða politiska semju, sum tryggjar, at einki øki verður við sviðið soð. Hetta er ikki nakað, sum noyðist at henda í morgin, men vit sleppa neyvan undan hesum kjaki, um vit skulu brynja okkum til framtíðina við einum bygnaði, har 85% av okkum búgva í einum og sama øki. Vit skulu ynskja norðingum og øllum Føroya fólki tillukku við tunnlinum og vedna aftur til hesa stóru og gleðiligu hending í vikuskiftisblaðnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Øll skulu ferðast frítt



JOHAN DAHL
løgtingsmaður

**Allir Føringar eiga at fáa sama møguleika, nevniliga at sleppa at ferðast frítt í vikuni sum Norðoyatunnilin letur upp – eisini suðuroyingar, heldur Johan Dahl**

Sjálvandi eiga suðringar, sandoyingar og arðir útoyggjabúgvar at fáa sama møguleika sum tey, ið sleppa at koyra ókeypis í eina viku gjøgnum ávikavíst Norðoya- og Vágatunnilin.

Um suðuroyingar ella sandoyingar skulu hava sama møguleika at sleppa at njóta samanbundnu norðoyggjar sum restin av landinum fær, so er tað ikki ov lítið at krevja, at vit eisini sleppa at ferðast hesa einu vikuna til og frá oyggjum okkara, fyri at hava møguleika eisini at uppliva og royna at koyra frá Havnini til Viðareiðis.

Skulu vit til Havnar fyri at sleppa at royna norðoyatunnilin so skal gjaldast fyri bil tvey vaksin og tvey børn kr. 630,00 fyri at koma aftur og fram.

Fólk við vanligari inntøku hava ikki ráð til nógvar túrar av hesum slagnum hvørt ár.

Hetta er ein sera høgur prísur at gjalda, og er tað eitt sum eigur at verða rættað í nærmastu framtíð og vóni eg at fyrispurningur Óla Breckmans til Bjarna Djurholm kann verða við at seta hol á just tað orðaskifti sum snýr seg um »samhaldsfastan prís« at ferðast í Føroyum – tað er tað einasta rættað.

SSL er nú gott nokk ikki eitt alment partafelag, tað eru tunnlarnir báðir, men landið eigur øll trý og eigur tí at viðvirka til at vit sum liva í Suðuroynni og Sandoynni verða líkastillað við restina av Føroyum og sleppa at royna nýggju samanbundnu norðoyggjar frítt í eina viku.

Annars vil eg hervið eisini ynskja Norðoyingum og restini av Føroyum hjartaliga tillukku við tunnlinum.

# Sigla frítt við Strandferðsluni



GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður

**Munnligur fyrispurningur til Bjarna Djurholm, landsstýrismann**

– Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um, at lata strandfaraskipini sigla samsvarandi og ókeypis í sama tíðarskeiði sum undirsjóvartunnlin til Klaksvíkar letur upp og ókeypis verður at koyra undir sundunum báðum fyrstu vikuni?

Í samband við at undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar verður tikin í nýtslu síðst í apríl verður lýst við, at ókeypis verður at koyra fystu vikuna. Hetta er galdandi fyri báðar undirsjóvartunnlarnar, og er hetta tiltak eitt frálíkt høvi fyri tey sum ikki ferðast ofta, at síggja tunnlarnar og landið annars. Fyri at geva øllum føroya fólki møguleikan til at síggja og royna tunnlarnar átti strandfaraskipini at siglt undir somu treytum sama tíðarskeið. Hetta hevði verulig knýtt Føroyar saman teir dagarnar og soleiðis givið øllum møguleikan at sæð tunnlarnar og umhvørvið rundan um.

# Rætta bakara fyri smið



BERGUR WARDUM

Í sambandi við, at Jógvan Páll Lassen advokatur hevur fingið Dan Klein blaðstjóra á Oyggjatíðindum dømdan at mortifisera úttalilsi hjá undirritaða Bergi Wardum, skal verða gjørt vart við, at undirritaði hevur tikið vitnisábyrgd av sínum úttalilsum og heldur fast við tey.

Av tí at dómurintók støði í, at Dan Kleinátti at víst størri, eftir at hann varð dømdur at hava ærumeitt Joen H. Andreasen, fyrrverandi sorinskrivara, við at hýsa úttalilsum hjá undir ritaða, og við tað at fyrn ing arfreistin ein ans er hálvt ár, skal fyrn ing ar freistin fráfallast í nevndu málum.

Heitt verður á Jógvan Páll Lassen advokat og Joen H. Andreassen, fyrr ver andi sorinskrivar og løg tingsins umboðsmann, at reinsa seg ella at tvinga Dan Klein blaðstjóra á Oyggjatíðindum at uppfylla nevndu dóm ar við at stevna undir rit aða, ið eigur úttalilsini, og við kravi um morti fika sjón fyri at fáa stað fest, um dómarnir kunnu upp fyll ast, ella um rætt ur in eig ur at afturkalla dóm arnar.

Tað hevði verið meira virðiligt, um nevndu løg frøð ingar, Jógvan Páll Lassen og Joen H. Andreassen, eins og rætt ur in vístu virðing fyri § 77 í Grundlógini og § 10 í Mannarættindakonven tión ini, ið heimilar tali- og skrivifrælsi undir egn ari ábyrgd, og lótu vera við at avrætta bakara fyri smið við dómum, ið einans kunnu uppfatast, við at okkurt skuldi verjast, ið ikki toldi dagsins ljós, ið er tað sama sum Berufs ver boten!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.